# Statoil seinkað – BP framskundar

**Tað finnast fáir pallar, sum kunnu bora á djúpum vatni við Føroyar. Tí stendur og fellur alt við, at boripallarnir eru tøkir til ætlaðu tíðina. Statoil-samtakið fer at útseta sína boring ein mánað, meðan BP helst framskundar sína ein mánað**

OLJULEITING
*Jan Müller*

Statoil, sum stendur fyri boringini hjá oljufeløgunum Phillips, Veba Oil og Enterprise Oil, hevur gjørt av at flyta ætlaða boristaðið nakrar kilometrar frá síni upprunaligu ætlan. – Ætlanin var at bora í blokki 6005,19 nakrar fáar kilometrar frá markinum, men eftir at hava hugt nærri at jarðfrøðiligu upplýsingunum frá økinum longur norðuri hava vit gjørt av heldur at bora í grannateiginum 6005,15 sigur Rúni Hansen, stjóri fyri leitingini hjá Statoil við Føroyar. Upprunaliga ætlanin var at bora í sokallaða Pegasusprospektinum og síðani at bora hin brunnin í Longuprospektinum fyri norðan. Nú er so býtt um uppá hesi bæði. Hetta merkir so aftur, at komandi boring hjá Statoilsamtakinum nú liggur tætt upp at tí økinum, har BP fer at bora í summar.

Í hesum sambandi skal kanningarskipið Geo Searcher gera kanningar rundan um ætlaða boriplássið. Skipið hevur ligið á Havnini í nakrar vikur og bíðað eftir veðri. Men enn eru aldurnar ov høgar til at gera hesar kanningar. Rúni Hansen sigur, at tær nýggjastu metingarnar siga, at økið fyri norðan, sum liggur tætt uppat loyvinum hjá BP sýnist at vera so mikið áhugavert, at teir hava valt at byrja við tí og verður tí neyðugt við ymsum kanningum av botninum. Í fjør gjørdi eitt annað kanningarskip, Geo Scanner kanningar á havbotninum í tí upprunaliga boristaðnum.




*Pílurin vísir nýggja boristaðið hjá Statoil fyri norðan í 6005,15. Upprunaliga varð ætlanin at bora í 6005,19. Krossarnir vísa annars, hvar teir ymsu brunnarnir verða boraðir.*

**Seinkað**

Ætlanin var annars at fara undir at bora í juni, men tað verður so helst útsett nakað. Boripallurin Sovereign Explorer, sum Statoilsamtakið hevur leigað til hesa uppgávuna, hevur borað í Afrika og hevur eisini havt eydnuna við sær har, soleiðis at tað fara at ganga nakrar vikur eyka, áðrenn pallurin kemur inn í føroyskan sjógv. Hann skal eisini fyrst bora ein brunn í írskum sjógvi.

Rúni Hansen sigur, at teir tí helst fara at bora ein mánaða seinni enn ætlað tvs. hol verður sett á seinnapartin av juli. Hetta kann fáa avleiðingar fyri Amerada Hess-samtakið, tí teir skulu brúka sama pall sum Statoil. Vanlig tekur tað millum 50 og 60 dagar at bora ein brunn, so vit nærkast oktober mánað, áðrenn boripallurin verður tøkur hjá Amerada Hess-samtakinum. Sosialurin skilur, at hetta nýtist ikki at vera nakar trupulleiki, men tað skulu so heldur ikki koma fleiri seinkingar, um Amerada Hess skal bora við hesum pallinum í ár.

**BP framskundar?**

Síðani er tað BP, sum eisini fer at bora í summar, møguliga tveir av teimum trimum brunnunum, sum felagið hevur játtað at bora komandi trý árini. Ætlanin var at bora fyrsta brunnin um ólavsøkutíð, men Sosialurin skilur, at BP helst fer at framskunda boringina til í juni. BP hevur leigað pallin Jack Bates til uppgávuna.





*Pallarnir Sovereign Explorer og Jack Bates skulu bora 3-4 brunnar á føroyska landgrunninum í ár.*

# Boristjóri hjá Statoil hevur góðar vónir

**Hann hevur staðið á odda fyri boringum í Norðsjónum, við afrikonsku strondina og í Meksikanska flógvanum seinastu 21 árini. Nú setir hann sítt álit á føroyska landgrunnin.**

FYRIREIKING TIL OLJUBORING
*Jan Müller*



*Á nýggju skrivstovuni hjá Statoil í miðbýnum í Havn fer at verða nógv virksemi komandi mánaðirnar. Her er partur av manningini, Rúni Hansen, stjóri, Jon Inderhaug, stjóri og Louisa Fjallsbak, sum er sett sum skrivari hjá Statoil-leiting. Mynd Jens K Vang*

Nú norska oljufelagið Statoil ger klárt til at bora á føroyska landgrunninum um góðar fýra mánaðir er »boriliðið« við at fáa fast undir fótum her á klettunum. Tey umleið 12 fólkini, tey flestu norskir serfrøðingar í oljuleiting, koma til Føroya í næstum. Nú skrivstovan er komin uppá pláss í miðbýnum í Havn og íbúðir eru leigaðar til manningina er boristjórin ella sum tað verður nevnt á altjóða oljumáli »the drilling manager« komin til Føroya úr Nigeria at standa fyri neyðugu fyrireikingunum. Hann eitur Helge Håland og hevur drúgvar royndir í oljuheiminum. Hann hevur starvast hjá Statoil í 21 ár og hevur harvið verið við í meginpartinum av oljutilgongdini í Noregi, sum byrjaði fyri umleið 30 árum síðani.

Í kavaveðrinum fríggjadagin leitaðu hann og føroyski stjórin á leitideildini hjá Statoil í Føroyum, Rúni Hansen sær niðan í Hoyvík at hitta leiðsluna í Oljumálastýrinum. Har høvdu topparnir í føroysku oljuumsitingini høvi til at hitta boristjóran, sum – hvør veit – kanska verður tann fyrsti til at útrópa Føroyar sum oljutjóð.

Sum so skuldi hann havt neyðugu royndirnar. Tí øll hesi árini hjá Statoil hevur hann staðið á odda fyri

Framhald niðast á síðu 13.

# Skjøtil settur á nýtt tíðarskeið í flogferðslu

**– Eg ivist onga løtu í, at tað verður full undirtøka fyri, at eitt føroyskt felag nú mennir seg til at taka við avbjóðingum í oljuvinnuni. Tað er tað mest náttúrliga, sum kann henda í Føroyum sigur Magni Arge, stjóri**

FLOGFERÐSLA OG OLJULEITING
*Jan Müller*



*Magni Arge, stjóri í Atlantsflog her á royndartúri við Bristowtyrlu.*

*Mynd Jan Müller*

Útlendsku oljufeløgini, sum hava fingið leitiloyvi við Føroyar, hava eftir øllum at døma valt at brúka føroysk feløg sum veitarar bæði á landi, sjógvi og í luftini. Við hesum má sigast, at tey royna at liva upp til andan í oljulógini um føroyska luttøku. Herfyri avgjørdu oljuufeløgini at lata einum føroyskum samtaki sáttmálan um útgerðarvirksemi og nú hava tey so valt eitt samtak við Atlantsflog og bretska felagnum Bristow til at taka sær av flutningi av fólki millum pallar og land og millum Føroyar og Skotland.

Magne Arge, stjóri í Atlantsflog er sera fegin um avgerðina, sum merkir, at føroyska flogfelagið kemur at uppliva tvær stórar avbjóðingar í ár á tyrlusíðuni. Onnur hevur samband við leiting og bjarging fyri Fiskimálastýrið og kemur tann tyrlan til føðingardagin hjá Atlantsflogk 28. mars. Og nú kemur oljuflúgvingin, sum vit skulu fyrireika okkum til í summar.

– Hetta má vera ein tann mest spennandi dagurin í føroyskari tyrlusøgu, síðani Strandferðslan byrjaði tyrluflúgving fyrst í 80-unum sigur Magni Arge og heldur fyri, at hetta er ein stórur dagur fyri føroyska flogferðslu, tí hann er ein nýggj byrjan og leggur lunnar undir eitt heilt nýtt tíðarskeið í føroyskari flogferðslu.

### Herðaklapp

Magni Arge heldur avgerðina vera eitt herðaklapp til tað stóra arbeiði, sum er gjørt fyri at menna ein kunnleika til at reka flogferðslu í Føroyum. Eitt stórt arbeiði er gjørt, sum byrjaði nettupp við tyrluflúgving og síðani helt fram við vanligari flúgving og er bygdur upp ein førleiki at viðlíkahalda og flúgva tyrlur og flogflogfør og eisini at standa fyri rakstrinum av tí. Og nú eitt nýtt høvi býðst at menna slíkt virksemi í Føroyum, sum hevur smá kor tí marknaðurin er so lítil, so er tað sera gott.

Sáttmálin inniheldur tveir partar. Annar er flúgvingin við vanliga flogfarinum millum Føroyar og Skotland. Tá ein boripallur er í økinum verða upp til 3 ferðir um vikuna, og eru tveir pallar her er talið av ferðum 4 ella fleiri. Her verður talan um at byggja upp eina nýggja farleið, sum eisini kann fáa stóran týdning fyri føroyska brúkaran. Hin parturin er so at flyta arbeiðsfólk millum pallin og land við tyrlum hjá Bristow.

Tað gevur so eisini Atlantic eitt nýtt bein at standa á, um so er, at olja verður funnin. Og verður hon funnin, so hevur Atlantsflog sett seg á eina sera rók, har man kann vera ein týðandi partur av tyrluflúgvingini. Hetta ger, at ein kann útvikla fyritøkuna, nakað, sum man annars ikki hevði kunnað. So henda avtalan hevur avgerandi týdning fyri at kunna menna flogfelagið sigur stjórin í føroyska flogfelagnum.

### Føroysk luttøka

Nú útlendsku oljufeløgini hava valt føroysk feløg til bæði útgerðarvirksemi og nú eisini flogvirksemi, heldur Magni Arge, at tað vísir, at føroyskir myndugleikar hava gjørt rætt við at leggja so stóran dent á føroyska luttøku og eisini hava undirstrika hetta í sjálvari lóggávuni.

– Eg haldi hetta er ein samanblanding millum hetta við at liva upp til andan í lógini og so tað praktiska, sum liggur í hesum at fáa føroysk feløg at taka sær av uppgávunum. Magni Arge heldur, at føroysku veitararnir, sum veruliga kunnu lata eina kappingarføra vøru, høvdu kanska ikki staðið seg so væl, um ikki tað varð ásett í lógini, at eisini føroyskir veitarar skulu vera við.

Verður olja funnin við Føroyar so kann talan blíva um týðandi inntøkur til Atlantsflog og ikki minst eitt virksemi, sum verður alt árið. Tað fer so at geva felagnum ein møguleika at vaksa.

Magne Arge sigur, at hann sær fram til eitt samstarv við Bristow, sum teir hava góðir royndir við. -Teirra royndir við fyritøkum í nýggjum økjum passar sum fótur í hosu til okkara uppfatan, tí Bristow hevur orð fyri at lata upp til lokal feløg at taka sær av uppgávunum. Magni Arge sigur, at teir tó ikki eru so stórir at teir skulu til at gera stórar íløgur og tí kemur tað væl við at kunna leiga tyrlur frá øðrum og fáa kunnleika frá teimum innan viðlíkahald, eykalutir oa.

Tað verður eisini nógv meira arbeiði vesturi í Vágum, tá oljuleitingin byrjar. Tað merkir so, at teir koma at flúgva nakað minni millum onnur lond, eitt nú Ísland og Grønland. Á tyrlusíðuni skulu annars fleiri fólk setast í sambandi við bjargingartænastuna.

Magni Arge sigur, at tað hevur stóran týdning at fáa eitt gott samstarv við flogvøllin í Vágum, sum hevur ein sera týðandi leiklut í øllum slíkum. Eisini skulu nøkur viðurskifti fáast uppá pláss við Statens Luftfartsvæsen og landsstýrið. -Eg ivist onga løtu í, at tað verður full undirtøka fyri, at eitt føroyskt felag nú mennir seg til at taka við avbjóðingum í oljuvinnuni. Tað er tað mest náttúrliga, sum kann henda í Føroyum.

## Atlantsflog fingið alla oljuflúgvin gina

OLJUFLÚGVING
*Jan Müller*

BP kunngjørdi fríggjadagin vegna BP, Statoil og Amerada Hess, at sáttmálin um at veita tænastur, við flogførum og tyrlum, í sambandi við leitingarvirksemið á føroyska landgrunninum er tillutaður Atlantic Airways og Bristow. Atlantic Airways økir um túratalið millum Føroyar og Aberdeen, soleiðis at flogið verður upp til fýra ferðir um vikuna. Bristow fer í samstarvi við Atlantic Airways at veita tyrluflúgving millum Føroyar og leitingarøkið og fer at hava eina bjargingartyrlu í tilbúgving í Føroyum. Sáttmálaskeiðið byrjar miðjan juni, tá leitiboringarnar byrja.

Hesin týdningarmikli sáttmáli fer at tryggja betri flogsamband millum Føroyar og Aberdeen og til boripallarnar, sum fara at arbeiða á føroyska økinum. Fyristøðufeløgini á føroyska landgrunninum vænta eitt gott samstarv um komandi royndarboringarnar á føroysku loyvisøkjunum til frama fyri báðar partar stendur í tíðindaskrivi frá BP.

Sostatt er bæði útgerðarvirksemi og flogflutningurin nú komin uppá pláss í sambandi við fyrstu oljuleitingina við Føroyar í summar.

Framhald av grein á síðu. 12.

oljuboring í nógvum londum, í Norðsjónum, í Afrika, í USA og aðrastaðni við. Helge hevur m.a. verið við til at finna oljuna í nýggja Statoilfeltinum Siri í danska partinum av Norðsjónum. Hann hevur eisini verið knýttur at mongum áhugaverdum boringum í Norðsjónum, seinast Yme-feltinum, sum hevur víst seg at vera sera væleydnað.

Sum boristjóri arbeiðir Helge sum projektleiðari á landi. Tað verður hann, sum fer at hava høvuðsábyrgdina av fyrstu boringini við Føroyar. Hjá sær á skrivstovuni fer hann at hava umleið 12 fólk og harumframt eru nógv fólk á sjálvum pallinum. Frá juni og tveir mánaðir fram fara hann og hini fólkini á boriliðnum at vera til arbeiðis stóran part av samdøgrinum og fylgja tí helst fyrstu boringini nakrantíð á føroyska landgrunninum.

Helge kennir eisini til at bora á djúpum vatni. Tað árið hann arbeiddi í Nigeria boraðu teir á 1300 metra dýpi og vóru hepnir at finna nógva olju. Nú vónar inniliga, at teir gera eitt fund, sum kann koma Føroyum væl við. Hóast talan bert verður um at bora ein brunn hetta fyrsta árið, so heldur Helge møguleikarnar verða góðar fyri at raka við olju.

– Eg skal gera alt eg eri mentur fyri at fáa Føroyum og Statoilbólkinum eitt so gott úrslit sum til ber sigur Helge Håland.



*Helge Håland, boristjóri hjá Statoil júst komin til Føroya fyri at byrja fyrireikingarnar til fyrstu oljuboringina.*

*Mynd Jan Müller*